## Hálshøgdi vinkonuna

Ein 40-ára gamal maður gjørdist í gjár frá sær sjálvum og høgdi høvdið av vinkonu síni. Síðani gekk hann runti bygdini á griksku frítíðaroynni Santorini við avhøgda høvdinum í hondini. Tað eydnaðist løgregluni at handtaka mannin eftir at hann hevði sært ein løgreglumann og tvær kvinnur. Løgreglan noyddist at skjóta fimm skot í mannin fyri at steðga honum. Maðurin hevði sálarligar trupulleikar, men eingin væntaði kortini, at hann fór at hálshøgga 25 ára gomlu vinkonu sína, sum var lærari á oynni.

## Solsjenitsyn farin

Russiski rithøvundurin, Alexandr Solsjenitsyn, doyði um vikuskiftið. Tað upplýsir sonur hansara, Stepan Solsjenitsyn. Alexandr gjørdist kendur við bókum sum »Kræftafdelingen«, »I den første kreds«, »Gulaug Øhavet« og »En dag i Ivan Denisovitjs liv«, sum var hansara fyrsta skaldsøga og umrøður lívið í einari stalinistiskari fangalegu. Hann fekk Nobel-prísin í 1970, men varð útvístur úr Sovjetsamveldinum eftir at hava givið út bókina »Gulag Øhavet« í 1974. Hann búði nógvb ár í Vermont í USA, men flutti í 1994 heim aftur til Russland.

# Fáorðaður løgmaður



*Løgmaður er fáorðaður viðvíkjandi støðuni um Gerhard Lognberg og lagnhansara í flokkinum*

*Savnsmynd*

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er heldur fáorðaður í dag, tá komið verður inn á støðuna viðvíkjandi Gerhardi Lognberg og Javnaðarflokkinum. Hann hevur lítlan hug at gera viðmerkingar til málið, sum hann metir er eitt farið kapittul**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eftir eina rokmikla viku og rokfund í Javnaðarflokkinum fríggjakvøldið, vendu vit okkum til løgmann Jóannes Eidesgaard fyrrapartin fyri at vita, hvør hansara persónliga støða er til málið við Gerhardi Lognberg, ið hevur vent samgonguni bakið, og hvørs lagna í Javnaðarflokkinum tykist ótrygg.

Men løgmaður er heldur fáorðaður og hevur lítlan hug at gera viðmerkingar.

Hvat fert´tú at mæla til hendir við Gerhardi Lognberg og limaskapi hamsara í flokkinum?

- Nú er hetta ikki viðgjørt í starvsnevnd floksins enn, og vit fara at hava landsfund, so tað hevði ikki verið rætt av mær at komið alment fram og sagt, hvør skráin fyri fundin skal vera, sigur Jóannes Eidesgaard.

- Eg havi satt at siga ikki tíð at hugsa um støðuna viðvíkjandi Gerhardi, og eg meti hatta sum so eisini at vera eitt farið Kapittul, sum eg hvørki havi stundir ella orku at brúka tíð upá, nú politiska støðan er sum hon er, sigur løgmaður.

### Broytingar

Ja, er tað júst tí ikki løgið, at tú nú nýtir tíð til at tosa um politiska ideologi, nú tað leikar so hart á á politiska pallinm?

- Eg havi mælt til at vit í flokkinum taka eitt politiskt kjak, tí tað eru ymisk spenningsrák og nógvar meiningar í flokkinum. Tí hevði verið sunt við einum grundleggjandi kjaki. Og tað eru jú um øll virðini, sum eisini eru uppi at venda í samfelagnum nú, so sum fiskivinnan, og eisini eigur ríkisrættarliga støðan at vera partur av kjakinum. Skal Javnaðarflokkurin vera, sum hann altíð hevur verið, og ella skal flokkurin flyta seg, sigur Jóannes Eidesgaard.

Gerhard sigur, at tú hevur svikið hann, og hansara valdømið, og alt suðurøkið, Hvat er tín viðmerking til tað?

- Nei, hatta havi eg onga viðmerking til. Hann sigur enntá, at eg havi svikið Føroya fólk. At ein maður sigur so, sigur meira um mannin sjálvan. Annars havi eg ikki hug at gera viðmerkingar til slíkt, tí tað haldi eg meg ov góðan til, sigur løgmaður, ið viðgongur, at sum politiska støðan er, so hevur hann nóg mikið at hugsa um, og eisini er hann upptikin í dag av, at tingbólkurin skal hava fund um ymisk samgongumál.

Men tað er eftir øllum at døma ein fámæltur løgmaður, ið er á politiska vøllinum í dag, og sum hevur nóg mikið at hugsa um, nú hann leiðir fyrstu minnilutasamgongu í politisku søguni her á landi.

# Sjálvstýrisflokkurin ikki upp í samgonguna

**- Sum støðan er nú, dugi eg ikki at síggja, at vit skulu fara upp í samgonguna, sigur formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum á tingi. Hinvegin heldur hann eisini, at tað er skeivt at fella samgonguna enn**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Sjálvstýrisflokkurin fer ikki upp í samgonguna.

Tað staðfestir Kári P. Højgaard, formaður Sjálvstýrisfloksins á tingi

Hann sigur, at Sjálvstýrisflokkurin fer nú at viðgera politisku støðuna í allari floksleiðsluni.

Men hann sigur, at sum støðan er nú, dugir hann ikki at síggja nakran møguleika fyri, at Sjálvstýrisflokkurin fer upp í samgonguna.

Hóast Gerhard Lognberg er farin burtur úr, eru tað aðrir limir í samgonguni, sum hava eina ógreiða støðu.

Eitt nú er ivingarsamt, hvar tey bæði tjóðveldisfólkini, Bergtóra Høgnadóttir Joensen og Páll á Reynatúgvu flóta. Fyrrnevnda kennir seg ikki bundnan av tunnilstilmælinum og seinni nevndi krevur, at tunnilin byrjar tíðliga í 2011.

- Sostatt er støðan so mikið óviss, at tað er toluliga greitt, at vit fara ikki upp í samgonguna, sigur Kári P. Højgaard.

### Fellur ikki løgmann

Men hinvegin dugir Kári P. Højgaard heldur ikki at síggja nakra skilagott í at fella samgonguna í løtuni.

- Vit vilja síggja tíðina ann, sigur Kári P. Højgaard.

Hann sigur, at tað eru nógv stórmál á skránni. Eitt nú skulu fiskidagarnir verða ásettir um tvær vikur og vit skulu hava nýggja fíggjarlóg.

Tí heldur hann ikki, at tað er rætt at skipa eina nýggja samgongu, sum støðan er nú.

Sostatt heldur Sjálvstýrisflokkurin ikki at grundarlag er fyri at fella samgonguna við einum misálitið, tí samgongan hevur helvtina av tinginum aftanfyri seg, men so er tað Gerhard Lognberg og vit teir báðir sjálvstýrararnir, sum taka støðu frá máli til mál.

- Støðan verður ikki tryggari at fella samgonguna, tí so skal nýggj samgonga skipast, ella í ringasta føri fáa vit nýval og tað halda vit ikki er rætta loysnin beint nú, við teimum stórmálum, sum eru fyri framman.

Hinvegin heldur Kári P. Højgaard. at Sjálvstýrisflokkurin hevur nógv mál, sum hann kann samstarva við samgonguna um.

Og á floksleiðslufundi í næstum fer flokkurin at viðgera støðuna og at fáa greiði á, hvørji mál, flokkurin skal leggja dent á.

- Vit eru í eini bíðistøðu og hesa tíðina, vit bíða, taka vit støðu frá máli til mál.